# Ronaldo skeyt hattrick

Brasilianski Ronaldo hevur ikki heilt gloymt, hvar málið stendur. Í gjár skeyt hann trý mál, tá hann og liðfelagarnir úr Corinthians vann 4-2 á Fluminense. Framherjin hevur nú skotið 11 mál í 21 landskappingardystum. Við sigrinum vann Corinthians seg upp á fimta plássið í bestu deildini í Brasilia.



# Gerrard longt sáttmála

Steven Gerrard spælur eftir øllum at døma við Liverpool til 2013. Í gjár longdi hann sáttmálan við felagið. Vikulønin verður 140.000 pund um vikuna. Steven Gerrard, sum er liðskipari hjá Liverpool, hevur áður sagt, at hann ætlar sær at gevast sum fótbóltsleikari í 2013. Tí bendir nógv á, at hann ikki fer at umboða onnur feløg á sínari yrkisleið enn barndómsfelagið.



Føroysku svimjararnir fingu frálík úrslit á Oyggjaleikunum í farnu viku

Mynd: Rókur í Jákupsstovu